

# Hotel Føroyar miðstøð fyri ráðstevnur

**Hotel Føroyar er nú limur í »Danske Konferencecentre«. Tað mekir, at hotellið er við i eini stórari ketu, sum bjóðar fram áhugaverd støð, har skeið, fundir, ráðstevnur o. a. kunnu haldast**

RÁÐSTEVNUMIÐSTØÐ

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

»Danske Konferencecentre« hevur til endamáls at bjóða kundum ókeypis ráðgeving og bíleggingartænastu í samband við ráðstevnur, skeið, tiltøk o. a. á skeiðsdeplum hjá limunum. Sekretariatið tekur sær av øllum sambandinum við skeiðsdepilin - sum nú eisini kann verða Hotel Føroyar.

Á heimasíðuni hjá Danske Konferencecentre (www.dkbs.dk) stendur, at vakra náttúran kring Hotel Føroyar gevur íblástur til nógvar ymsar aktivitetir.

- Har eru møguleikar fyri teambuildingaktivitetum og »adventure sports« er nærmast givið upp á forhond - ríðing, fjallatúrar, ornitologisk excursión, fiskiskapur, kaprógving og tyrlutúrar - bara fyri at nevna nakrar møguleikar, skrivar felagið.

Felagið sigur, at góðskuhugtakið er grundleggjandi fyri Danske Konferencecentre og harvið kjarnan í øllum aktivitetum felagsins.

- Sum kundi merkir tað, at tú altíð kanst vera vísur í einum høgum støði hjá limasentrunum, bæði hvat viðvíkur útgerð, teknikki, tænastu, fakligum innliti og fjølbroytni. Tað er okkara mál, at óheppin yvirraskilsi ikki skulu koma fyri, og tí virkar skrivstova okkara sum ein kvalifiseraður sparringspartnari - líka frá innleiðandi ætlanarfasuni og fram til sjálvt tiltakið, sigur felagið.

Men tað eru altso ikki øll, sum kunnu gerast limir í felagnum, og fyri at tryggja góðskuna skulu allir limir lúka serliga strong krøv. Eitt nú skal Dansk Teknologisk Institut gera eina gjølla kanning fyri at tryggja, at góðskukrøvuni kunnu uppfyllast. Síðani fær miðstøðin - í hesum føri Hotel Føroyar - eina góðkenning.

Men limirnir í Danske Konferencecentre verða tó javnan kannaðir av DTI til tess at tryggja, at støðið er sum tað skal vera.

## Camping.FO hevur stovnandi aðalfund

Á fundi herfyri tóku 40 kamping áhugaðir føroyingar stig til at stovna felag. Fundurin, var almennur. Á fundinum varð nevnd vald, og avgjørt varð at kalla inn til stovnandi aðalfund í Eydnuni á Oyrabakka 5. november. Felagið fekk eisini navn: Camping.FO

Í nevndini sita Ivan Skorheim, Arnhold Fjallstein og Thordis Reynstind. Katrin Haraldsen er eykalimur. Tey siga í tíðindaskrivi, at ætlanin er, at tey sum hava kampingvognar kunnu hava hesar við á aðalfundin, parkeringsmøguleikarnir við Eydnuna eru sera góðir.

Eisini ber til at koma fríggjadag og standa til leygardag. WC- og baðimøguleikar eru í Eydnuni.

Tey, ið koma fríggjadag verða biðin um, at siga frá hjá skrivaranum Thordis Reynstind tlf. 722644

Skráin á fundinum er:
Frágreiðing - Ivan Skorheim, formaður
Ásetan av limagjaldi
Framløga og samtykt av viðtøkum felagsins
Ymiskt

Øll kampingáhugaði eru vælkomin á stovnandi aðalfund, skrivar nevndin í Camping.FO.

**nud**

# Petur Pólson gevur út nýggja fløgu

**Vit hava ikki hoyrt nógv til Petur Pólson á tónleikaliga pallinum síðan Clickhaze góvust í 2003. Men nú trýnir heiðurskrýndi yrkjarin og tónleikarin aftur fram á Føroyska pallin við eini sterkari útgávu, sum meira enn so kann fara at seta djúp spor eftir seg**



*Petur Pólson*

PETUR PÓLSON
Nýggj fløga
Heiti: KOMA
Plátufelagið Tutl
Útgávudagur: 7. nov. 2005

7. november gevur Petur Pólson út fløguna »Koma«. Hetta er fyrsta solo fløgan hjá Peturi, sum fyrr hevur verið við í, og givið út saman við bólkum sum Visible Fish og Clickhaze. Petur, sum er ættaður úr Gøtu og av Toftum er eisini viðurkendur sum ein av okkara fremstu yrkjarum og megnaði at vinna M. A. Jacobsens Virðisløn fyri fagrar bókmentur fyri yrkingasavn sítt »Ongin sól er til«. Umframt at fáast við tónleik og yrkingar hevur Petur dagligt yrki sum lærari.

Flestu løgini á nýggju fløguni hevur Petur skrivað saman við gamla Visible Fish partnaranum, Eileri Hansen, meðan okkurt er skrivað saman við Knúti Hábergi Eysturstein og eitt lag eigur Simon von Konoy, sum Petur tó hevur lagt til rættis av nýggjum til hesa fløguna.

Tónleikaliga er talan um eina áhugaverda samansetingav ymiskum íblástrum úr ymiskum sambandum úr ymiskum tíðarskeiðum, sum Petur hevur arbeitt- og verið við í. Talan er um rokktónleik, í støðum í ætt við bæði Clickhaze og Visible Fish, men samstundis við sterkari rót til sangskrivarar sum eitt nú Bob Dylan, Nick Cave, Leonard Cohen, Tom Waits og aðrar.

Temaini eru tey tungu og ævigu - lívið og deyðin, kærleiki og hatur, frelsa og glatan, Gud og Sátan. Løg og tekstir kunnu metast sum bersøgin og erlig.

Tónleikararnir á fløguni eru allir virknir og virdir í øðrum samansetingum: Uni Árting (200, Knút H. Eysturstein) spælir trummur, Niels Jákup í Jógvanstovu (Gestir, Marius, Knút H. Eysturstein o.fl.) spælir bass, Knút Háberg Eysturstein (Gestir, Knút Háberg Eysturstein, Tuxedo Rebels) spælir ljómborð, Bogi á Lakjuni (Visible Fish, Clickhaze, Knút Háberg Eysturstein) spælir gittar og ljómborð, Eiler Hansen (Visible Fish) spælir gittar og mandolin og Petur

Pólson (Visible Fish, Clickhaze, Tuxedo Rebels) syngur.

Harararfturat hevur Petur eisini fingið fleiri prominentar og navnframar gestir og vinir at taka lut á fløguni. Eitt nú spælir Mikael Blak (200, Clickhaze, Mold o.m.o.) bass á tveimum løgum, Niels Arge Galàn (200, Mold) syngur og spælir gittar á einum lagi, Sámal Ravnsfjall spælir munnharpu og syngur á einum lagi, Guðrið Hansen syngur á trimum løgum og Kári Sverrisson (Enekk o.m.a.) spælir gadulka og syngur á tveimum løgum.

Fløgan er tikin upp í einum kjallara í Sandavági í tíðarskeiðnum apríl - juni 2005. Bogi á Lakjuni er framleiðari og hevur eisini staðið fyri upptøkunum, meðan Óli Poulsen hevur ljóðblandað og mastrað fløguna í Fix-n-Mix í Lyngby, Dk.

Húsa og kápumyndir hava Uni Árting og Niels A. Galàn gjørt úr myndum, sum eru tiknar í Sandavági av Eileri Hansen, Peturi Pólsyni og Una Árting. Uni hevur eisini sniðgivið heimasíðuna www.peturpolson.com. Tað er Plátufelagið Tutl, sum gevur fløguna út.

Fløgan verður í handlunum tann 7. november, men longu leygardagin 5. november verður útgávukonsert í Losjuni í Gøtu, har til ber at ogna sær fløguna. Tað er G! Music, sum skipar fyri útgávukonsertini. Les meiri um hetta á www.gmusic.fo

# Spennandi jólapakkar til fremmand børn

**Børn kring alt landið hava nú latið skógvaeskjur við jólagávum í, til tað prosjektið sum "Christmas Child" stendur fyri. Hósdagin fara tær av landinum til ókend børn í øðrum londum, - børn sum annars onga slíka gávu høvdu fingið á jólum í ár**

BARNAHJÁLP
*Orð/mynd: Snorri Brend*



*Børnini hava latið sínar gávur til onnur børn úti í heimi. Á henda hátt kunnu føroysk børn gleða onnur børn, hóast tey ikki kenna hvønn annan*

**Havn:** Tey hava longu nú keypt fyrstu jólagávurnar. Og seinasta sunnudag kundu tey so savna hesar jólagávurnar saman.

Runt um í samkomum kring landið komu børn og vaksin við eskjum í ávísari støðd. Nú skuldu tey føroysku børnini hjálpa børnum í øðrum londum, sum annars ikki høvdu fingið nakra jólagávu í ár.

Tað sást týðiliga, at hetta var nakað sum tey føroysku børnini brendu fyri, - og tey vaksnu við.

- Hetta er okkara máti at hjálpa øðrum børnum í øðrum londum. Hóast vit ikki kenna nakran av teimum, so vilja vit kortini gleða tey á jólum í ár, segði ein genta, sum kom við einari eskju seinasta sunnudag.

Henni á baki kom ein mamma við tveimum pakkum. Og tað sást eisini á henni, at hjarta hennara var við í hesi gávuni. Rørd og við gleði legði hon eisini sínar pakkar millum teir mongu, sum longu vóru savnaðir saman henda dagin.

Bara í Meinigheitshúsinum í Havn vóru væl oman fyri 200 gávueskjur savnaðar saman í samband við sunnudagsskúlan seinasta sunnudag.

Saman við hinum gávueskjunum, sum verða savnaðar saman kring alt landið, verður helst talan um fleiri túsund eskjur.

Hósdagin verða tær so savnaðar saman, og við farmaskipinum, sum fer úr Føroyum á middegi henda dagin, fara tær so av landinum.

Hesin møguleikin, sum prosjektið Christmas Child gevur børnum at hjálpa øðrum børnum, hevur nú verið í gongd tey seinastu árini í Føroyum.

Og líkt er til, at undirtøkan í ár verður størri enn nakrantíð.